

# Aðalfundur

Aðalfundur verður mánakvøldið
19. oktober 2009, kl. 19.00, í ÍSF-húsinum.

Skrá sambært lógunum.

**FØROYA FIMLEIKASAMBAND**

# Jólasølan í Kvívík

**Verður í Glæmuni 28. novembur frá kl. 14 til 19.**

**Tey, ið ynskja at verða við, kunnu ringja tlf 211490 ella 212442**

**Bygdarfelagið Glæman**

Tekna teg sum haldara nú fyri einans

## 495,- um ársfjórðingin

**Sparið 560,- í mun til leysasølu!**



nær sum helst, hvar sum helst

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óposstað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

Sosialurin Boks 76 · FO-110 Tórshavn

**Miðnámsskúlin í Suðuroy**

# Skrivstovufólk til Miðnámsskúlan í Suðuroy

Eitt hálvtíðarstarv sum skrivstovufólk á Miðnámsskúlanum í Suðuroy er leyst til setan hálvan oktober 2009.

**Arbeiðsuppgávurnar umfata alt skrivstovuarbeiði fyri skúlan, eitt nú:**

- brævaskifti skúlan
- skráseta fráveru og próvtøl
- journalrøkt
- bóking
- ymiskt samskifti við lærarar og næmingar

**Vit vænta, at tú:**

- hevur skrivstovuútbúgving
- gott mál og hollan kunnleika til skrivligt føroyskt
- kunnleika til edv-forrit sum Word, Excel og Outlook
- royndir í at samskifta við ymisk fólk
- góð samstarvsevni
- góð evnir at arbeiða sjálvstøðugt

Kunnleika til BSL og FSL er ein fyrimunur.

Arbeiðsstaðurin er móttøkan á Skúladeplinum í Suðuroy, og vit bjóða eitt spennandi arbeiði í einum livandi og lívligum umhvørvi.

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn:**
Umsóknir við prógvum, váttanum og/ella viðmælum fyri arbeiðsroyndir skulu sendast til Miðnámsskúlan í Suðuroy, Att. Ole Laursen, deildarleiðara, Grønudalur 2, FO-950 Porkeri. Umsóknin skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 30 september 2009.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# ALMENN MÓTTØKA

Tann 1. august 2009 varð Vagn Foldbo settur sum skúlastjóri við Fuglafjarðar Skúla. Í hesum sambandi verður almenn móttøka fyri honum í skúlanum fríggjadagin 18. sept. 2009 kl. 14.00.

**Skúlastýrið við Fuglafjarðar Skúla**

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

# Fiskivinnuroyndir 2010 Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleiðni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**

- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Innanfyri høvuðsøkini verður í ár lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu hava orkusparing við sær.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[1].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. okt. 2009, kl. 12:00

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2010.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Heykavegur 6A
FO-110 Tórshavn

[1] max. 300 kkr./ár í 3 ár